Fíggjarligir munir millum Føroyar og Danmark:

Man fær umleið 1000 kr meira í SU (aftanná skat) enn tú fært í studni. Harumframt er skattafría inntøkan nógv hægri í Danmark grundað Føroya frádrátturin.

Stuðulin til lesandi foreldur er eisini hægri í Danmark. Barna stuðulin er hægri, og sum einligur uppihaldari fært tú dupult SU í Danmark, meðan tú fært 1.762 kr í Føroyum.

Har eru fleiri lestrarbústaðir í Danmark, og man kann fáa leigustuðul fyri nógvar av teimum.

Fíggjarlig viðurskiftið millum lesandi á Setrinum:

Kanningin var gjørd summarið 2024 og 49,4% av teimum lesandi á Setrinum svaraði.

Lesandi í Føroyum eru í høvuðsheitum eldri. Tey hava størri tilknýti til Føroyar og ein stórur partur búgva saman við makað og/ella børn (63,8%). Mangul uppá tey sum eru millum 18-25 ár.

Nógv stúra um fíggjarligu korini (43,4% allatíðina ella ofta, og 37,7% viðhvørt). Tey hava lítið á konto (67,6% hava beint um 0 kr ella undirskot, í endanum av mánaðin) og bert 27,5% siga seg kunna gjalda ein rokning uppá 1000 kr lættliga.

84,4% av lesandi arbeiða við síðurnar av lestrinum, og tey arbeiða í miðal 14,8 tímar um vikuna. 78,6% siga at tað er neyðugt at arbeiða fyri at fáa tað fíggjarliga at hanga saman. Arbeiðið gongur tó útyvir lesnaðin (57,9%).

Sum er, eru fleiri lesandi, ið viðmerkja, at tey ikki høvdu viðmælt nøkrum at lesa í Føroyum, tá ið tey hoyra, hvussu nógv betur ymisk kor, millum annað fíggjarligu korini, eru, hjá teimum, ið lesa niðri.

Kanningin fevnir ikki um tey, sum hava valt ikki at lesa í Føroyum, tí tey ikki fáa tað at fíggjarliga hanga saman. Tí eru tølini helst betri, enn tey høvdu verið, um hesi vóru tikin við.